

telefon: 34 18 00 telefax: 34 18 01 teldupostur: post@sosialurin.fo á netinum: www.sosialurin.fo

# Sosialurin ynskir øllum eina góða Ólavsøku








:: Týsdag
:: Mikudag
:: Hósdag
:: Fríggjadag
:: Leygardag

Teknað eitt hald fyri einans 400,-kr. um ársfórðingin og spar 380,- kr í mun til at keypa hann í leysasølu. (600 kr. um ársfjórðingin í Danmark - ella 500,- kr. fyri 5 bløð 1 ferð um vikuna)

Um tú frammanundan er haldari, kanst tú haraftrat halda Internetsosialin fyri einans 120,-kr. um árfjórðingin.

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ______

Bústaður: ______

Postnr.: ______

Bygd/býur: ______

Telefon nr.: ______

Undirskrift: ______

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Mong eru bløðini
-eittans er blaðið





# Føroya Koyriskúli

**Jekaragøta 10 · 100 Tórshavn**

Nýtt teoriskeið til persónbil byrjar 30. juli 2003 kl. 17.30

Motorsúkklukoyrikort byrjar kl. 19.30

**Tekning:** **Stanley Olsen** tel 21 10 99
**John Christiansen** tel 21 47 75
t-post: stanley@post.olivant.fo

## 10-mannafar og 19 tonsari til sølu

- Nýbygt 10-mannafar til sølu fyri 45.000 kr.
- 19 tonsari Hamranes uttan fiskiloyvi til sølu.

**Tlf. 44 80 74 ella 28 12 74**

## Frá Føroya Psoriasisfelag

Vit vilja hervið boða frá, at komandi viðgerðartúrur til Bláa Lónið verður frá 26.09. til 24.10.2003.

Tey, ið hava tørv á viðgerð, verða biðin um at fara til egnan kommunulækna. Læknin fyllir umsóknarblað út og sendir tað til húðlæknan.

Umsóknin skal latast inn í seinasta lagi 15.08.03. Um ivaspurningar eru hesum viðvíkjandi, eru tit vælkomin at ringja á tlf. 424179.

## Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan afturlatin frá mánadegi 28. juli til fríggjadagin 8. august.

Í summarfrítíðini ber til at ringja á tel 28 29 19

Opið aftur sum vanligt mánadagin 11. august

**Føroya Lívstrygging**

LÍV

## Bilur til sølu



Toyota 2.0 TD vøruvognur. Koyrt 73.000 km. Felgur v/píkum fylgja við.

**Tlf. 320220**



## Sethúsini Suðurrás 10, Tórshavn, til sølu




Húsini eru í 3 hæddum. Kjallari og miðhædd á 84 kvm og loft á 75 kvm. Grundøkið er 400 kvm. Byggiár 1974.

Í kjallararnum er íbúð við køki, stovu, kamari og wc. Eisini er vaskirúm, hjallur, fýrrúm og kjallararúm við trappuuppgongd.

Í miðhæddini er køkur, stova, 2 kømur, baðirúm, gongd og durur.

Á loftinum er stova, 2 kømur, wc og lítil gongd.

Húsini og havin eru vælhildin. Húsini standa í friðarligum barnavinarligum umhvørvi og stutt er oman í býin.

Áhugað ringið **223369**

## SUMMARFRÍ

Stongt verður frá 28. juli.
Byrjað verður aftur 18. august.

**Verkstaðið VÓN**
Hóvabrekka 1 · Argir

# Kunngerð um ferðslu á Ólavsøku 2003

Ólavsøkuaftan og ólavsøkudag 28. og 29. juli frá kl. 14.00 til næsta morgun kl. 8.00 verða hesar broytingar í ferðsluni:

Bilferðsla er **ikki** loyvd, eftir **Kopargøtu, á Áarvegnum og niðan á Vaglið, í N. Finsensgøtu frá Vaglinum og niðan til AUTO, ella í Mylnugøtu.**
Parkering er heldur ikki loyvd á hesum økjum.

Vanlig bilferðsla er **ikki** loyvd tvørtur um **Niels Finsensgøtu á vegamótinum Bøkjarabrekka/Steinatún,** undantikin eru hýruvognar, Buss- og Bygdaleiðir.
Um hetta vegamót gongur støðugt nógv fólk, tí má koyrast við størsta varsemi.

**Í Niels Winthersgøtu, í Steinatúni og í Bøkjarabrekku** er loyvt hýruvognum at søkja hýru.

Meðan kappróðurin fer fram ólavsøkuaftan, er **Eystara Bryggja stongd** fyri vanligari bilferðslu **frá Kongarbrúnni til Jónas Broncksgøtu** frá kl. 14.00 til kl. 19.00.

Á parkeringsøkinum á Bursatanga er ikki loyvt at parkera frá 27. juli kl. 20.00 til 29. juli kl. 9.00.

**Ólavsøkudag,** frá kl. 10.00 til kl. 14.00, verður øll ferðsla um **Vaglið** órógvað og ikki kann roknast við, at koyrandi verður eftir Mylnugøtu, Áarvegnum um Vaglið v.m. vegna skrúðgongu úr Føroya Løgtingi í Dómkirkjuna og aftur.

Tórshavn, hin 23. juli 2003

**Politiið**



## Summarfrí

Eingin avgreiðsla verður frá 4. august til 15. august 2003.

**Sandoyar Sjúkrakassi**